# Shell sóknast eftir bilførara

Eitt starv sum tangabilførari hjá Føroya Shell í Havn er leyst at søkja at seta sum skjótast.

**Tann, vit leita eftir**
Er nærlagdur og leggur dent á trygga koyring og góða kundatænastu. Stórt koyrikoyrt er krav, og umsøkjarar, ið eru vanir við tunga ferðslu, hava fyrimun.

**Vit kunnu bjóða**
Góðar arbeiðsumstøður og løn sambært sáttmála við Havnar Arbeiðsmannafelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Andrias Jacobsen á telefon 34 74 00.

Hevur hetta tín áhuga, send okkum umsókn tína sum skjótast, annaðhvørt til: Føroya Shell, postboks 188, 110 Tórshavn, ella sum teldubræv til shell@shell.fo



**Hugsar tú um eina betri framtíð?**
**www.shell.fo**

Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 8 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn
Telefon 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo

REPROZ

# Hjálparfólk



HOTEL STREYM søkir eftir einum hjálparfólki at byrja 1. apríl.

Tú kemur at hava høvuðsábyrdina av at halda gistingarhúsið reint og hugnaligt.

Harumframt skalt tú eisini hjálpa til í móttøkuni, í køkinum og annars ikki verða bangin fyri at taka eina eyka hond í, tá á stendur.

Umráðandi er at tú ert fyrikomandi og kanst arbeiða sjálvstøðugt.

Roknast kann við at arbeiðstíðin svarar til hálvtíðarstarv

Løn sambært sáttmála við S&K

Nærri fæst at vita við at ringja á tel. 355 500 og spyrja eftir Jens Tummas

hotel streym
TÓRSHAVN

Yviri við Strond 19 110 Tórshavn
Tel 355 500 Fax 355 501
www.hotelstreym.com booking@hotelstreym.com



P/F Supply Service

FO-520 Leirvík
Faroe Islands

Tel +298 44 33 47
Fax +298 44 33 49
www.sjoborg.fo

# FÍGGJARLEIÐARI TIL P/F SUPPLY SERVICE

P/F Supply Service søkir eftir fíggjarleiðara at byrja 1. mai 2007. Til felagið eru eisini knýtt onnur feløg innan fiskivinnu, fastogn o.a., sum tú eisini fert at hava ábyrgd av.

**Starvsøkið**
Til starvsøkið hoyra millum annað:
- Fíggjarætlanir
- Mánaðar- og ársroknskapir
- Lønarviðurskifti starvsfólksins
- Ábyrgd av bókhaldi, skuldarum og ognarum

**Førleikar tínir**
Dentur verður lagdur á, at tú hevur:
- Hollan kunnleika til bókhald og roknskap
- Kunnleika til bókhaldsskipanina Navision
- Evni at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum

**Løn**
Lønin verður ásett eftir avtalu og við hygni fyri útbúgving og royndum. Tú fert at hava beinleiðis tilvísing til stjórarnar.

**Umsókn og tíðarfreist**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til P/F Supply Service, Kulibakki 8, FO-520 Leirvík og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2007.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jens Meinhard Rasmussen, tlf. 28 33 47. Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

REPROZ

STARVSLÝSING

# Goymslufólk

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi goymslufólki til maskinmiðstøðina í Kollafirði at byrja skjótast til ber. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

**Arbeiðsuppgávur**
· útflýggjan av eykalutum og amboðum
· viðlíkahald av goymslu og amboðsrúmi á maskinmiðstøðini

**Førleikakrøv**
Tann, ið settur verður, skal hava royndir innan goymslustýring og hollan teldukunnleika. Harumframt er kunnleiki til entreprenørmaskinur og lastbilar ein fyrimunur, men eingin treyt.

Umsøkjarin skal hava vanligt koyrikort.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast Landsverki, Postsmoga 78, 110 Tórshavn,

ella til lv@lv.fo, og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 28. mars, 2007. Merkið umsóknina „Umsókn goymslufólk.“ Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tlf. 540 950 ella umvegis teldupost jpp@lv.fo. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur og flogvallamál. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*